# HEILSANIR



**Góða Esther/-pleygumamma**
Hjartalig tillukku við føðingardegnum og alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja Lowlanders**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið gjørdu okkum silvurbrúðleypsdagin so hugnaligan og ógloymandi við at seta tykkara serliga dám á og hjálptu til á ymiskan hátt. Ein serlig tøkk fyri sang og morgunmat silvurbrúðleypsmorgunin.
**Heilsan Jastrid og Johan Sigurd**



**Allarbesta gumman og gubbin**
Hjartalig tillukku á 1 ára hjúnabandsdegnum tann 28. og nógv góðar ár í framtíðini.
**Allarbestu heilsanir frá Sharon Thoru**
**PS.** Takk fyri at tit eru so góð við meg



**Góða Esther og Emly**
Tillukku við 110 ára føðingardegnmum. Nú eru tit gamlar, men glaðar, blíðar og smílandi, sum altíð. Haldið á við tí.
**Heilsan stríðsfelagarnir**



Kom her so skal eg læra teg at rógva. Tillukku við 30 ára degnum.
**Heilsan síðumaðurin**



Hvat gjørdi tú beint áðrenn hendan myndin bleiv tikin. Ja, tað eru bert vit sum vita, men í ørviti ert tú og tú flenti nógv hetta kvøldið.
**Heilsan songdeilarin**



**Góða lítlasystir okkara Nomi**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum 27. juni. Vit eru so góð við teg.
**Ynskja Miriam, Benjamin og Filip**



**Góða elskaða Eyð**
Hjartaliga tillukku við 15 ára føðingardegnum, og alt tað besta. Jesus pápi verið hjá tær.
**Ynskja mamma, babba og Otto**



**Mín fitta Eyð**
Tillukku við 15 ára degnum jóansøkudag. Her er tú fitt og lítil, nú ert tú stór og fitt. Takk fyri at tú ert so røsk og fitt at passa uppá meg.
**Ynskir systir tín Oddbjørg**



Skál og tillukku við degnum. Nú mást tú halda orð og vinna á jóansøku.
**Heilsan manningin á Nólsoyingi**
**PS.** Royn og set á



**Góði Hans Petur**
Hjartaliga tillukku við fýratiáradegnum 26. juni.
**Heilsan vit bæði í Heygunum**



**Tillukku góða Anna**
Hendan fitta prinsessan fyllir 1 ár 26. juni. Omman og abbon vóna tú fær ein góðan dag. Vit elska teg.
**Heilsan omman, abbon og mostir**



**Góða Nomi**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum. Alt tað besta ynskja vit tær.
**Mamma og babba**



Hvør var nú hann sum vann hesa sangkapping á Ibiza. TIllukku við piparinum.
**Heilsan teir somu**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á middegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ..........................................................
Bústaður: ....................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



# TILTØK

**Gudstænastur**
**3. sunnudag e. trinitatis**
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri Føroysku Sjómansmissiónina
*Havnar kirkja:* kl. 11, Marjun Bæk. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómansmissiónina
*Nólsoy:* kl. 12, Bjarni Bæk. (Talvangongur fyri Føroysku Sjómansmissiónina)
*Hestur:* kl. 12, Heri Joensen
*Eiði:* kl. 11 John Myllhamar
*Christianskirkjan:* kl. 11, altarg., Niels Pauli DAnielsen og Anker Nielsen, misjónsskr. (Luthersk Mission)
Trúboðaravígsla og útsending kl. 18 v/ Niels Paula Danielsen, Jóhann Henriksen og Leif Rasmussen. Peter O. K. og Anne-Lene Midjord Olofson verða vígd sum trúboðarar og send út til tænastu í Mbeya í Tanzania
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
*Glyvrar:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Sjóvar kirkja:* kl. 11 altarg., Jógvan Fríðriksson
*Fuglafjørður:* kl. 11, lestur. Torsdagskoret úr Flensborg syngur
*Húsavík:* kl. 12, Jákup R. Hansen
*Vágur:* kl. 11 (útvarpsgudstænasta),
*Sumba:* kl. 17, altarg., Patrick de Neergaard
*Øravík:* kl. 11,
*Fámjin:* kl. 12.15, Jónsvein Bech
*Vestmanna:* kl. 11, Jóannis Fonsdal
*Sørvágur:* kl. 11, Inga Poulsen Dam
*Porkeris kirkja:* Sunnudagin gongur talvan fyri sjómansmissiónina
*Vága prestagjald:* Talvan gongur fyri Føroysku Sjómansmissiónina

**Doulos**
**Leygardagin kl. 10:**
**Kunning um arbeiði við Logos Hope.**
Vit eiga nú eitt føroyskt skip (Norrønu 1) og nú leita vit eftir føroyingum. Um tú ynskir at fáa meiri at vita um Logos Hope og hvussu tú kanst hjálpa í arbeiðinum, so er hetta tiltakið júst fyri teg. Máltið verður umborð. Vinarliga ring um tú kemur.
**Sunnudagin kl. 14-17:**
**Familjudagur**
Gleðist yvir at síggja klovnar, fólk úr øllum heiminum í serstøkum tjóðbúnum, síggið mentanarligar framsýningar og fáið meiri at vita um arbeiðið umborð á Doulos. Ein seinnapartur fyri alla familjuna.
**Mánadagin kl. 19.30:**
**Serstakt kvøld fyri kvinnur:**
Eitt serstakt kvøld, har kvinnur kunnu koma umborð at njóta samfelagið við aðrar kvinnur og hoyra tær siga frá søgum úr øllum heiminum og at fáa íblástur, tá tit hoyra um, hvussu kvinnur verða brúktar av Gudi í samfelagnum í dag.
*Opið er umborð fyri almenninginum mán.-leyg. kl. 10-22 og sunnudag kl. 14-22.*

**Lívdin**
*í Fimleikarhøllini*
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjuløta saman við børnunum við sangi og søgu. Kl. 11.10 ein steðgur við drekka. Tilbiðjanarmøti verður kl. 11.30 við talu, lovsangi og breyðbróting. Barnatiltak verður í Hoyvíkshøllini frá kl. 11.30-12.15. www.livdin.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Einki møti sunnukvøldið.

**Samkoman Rhema**
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli.
www.rhema.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Paula Høj, kl. 11.50 ABC »Reinsan við blóði Jesusar« 2. partur v/ Ásu Lützen, kl. 18 Evangel. møti – bólkur av skipinum Doulos luttekur.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Á møtinum luttaka fólk av trúboðanarskipinum Doulos. Sunnudagsskúlin er farin í summarfrí.
www.hebron.fo

**Meinigheitin í Hoyvík uppi á Brekku 3**
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Jógvan Steintún, evnið: Spakføri, sunnudagsskúlin er farin í summarfrí.
Útimøti á Vaglinum kl. 22 – um viðrar.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgunin kl. 7 Bønarmøti.

**Frá Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Umboð frá Doulos luttaka á møtunum. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Leygardagin kl. 11 Útifundur. Sunnudagin kl. 11 Møti, Palle Petersen talar, kl. 18 Møti við vitjan frá Doulos. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 9.30-12 Foreldur og børn – útferð – um viðrar.
Sunnudagin kl. 18 Blákrossmøti v/ Jaspur Langgaard, sangarar luttaka.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Orðsins tænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15.30-18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. »Ver her og vak við mær, vak og bið«.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Leynar og Kvívík**
Heimamissiónin hevur útimøti leygardagin kl. 19 í Leynum og kl. 21 í Kvívík.

## BRÚDLEYP

Fríggjadagin 2. juli kl. 16.00 giftast í Býráðssalinum í Havn Selma Ranghamar og Jóannes Kjølbro. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Leygardagin 3. juli kl. 14.00 giftast í Býráðshúsinum í Klaksvík, Heidi Neshamar, Tórshavn og Jógvan Kristin Olsen, Klaksvík. Dagurin verður hildin heima, Undir Grashjalla 9, Klaksvík, frá kl. 17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 3. juli kl. 15.00 giftast í Saksunar kirkju, Joan Haraldsen, Sandavágur og Gunnfríður Dahl-Olsen, Saksun. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 15.30. Eftir kl. 20.00 er vælkomst heima í Saksun.

10. juli kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Berghild Bjarkadóttir Skúvadal og Klæmint Mittún. Kl. 19.00 verður veitsla fyri innbodnum í HB-húsinum.

Leygardagin 17. juli giftast Charlotta Hentze, Saltangará og Remy Hansen, Nes. Vígslan verður í Berøa kl. 13.30. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu verða vinarliga biðin at siga frá áðrenn 2. juli á tlf. 447476, 509919 ella 220033.

17. juli kl. 14.00 giftast í Miðvágs kirkju Nicoleta Radu, Buzau Romenia og Øssur Hansen, Miðvágur. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, kunnu tekna seg á tlf. 556491 ella 226190. Seinasta freist at tekna seg er 5. juli.

24. juli kl. 16.00 giftast Gitte Johannesen og Finnur Klein í Dómkirkjuni. Veitslan verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00.

Leygardagin 31. juli kl. 13.30 giftast í Berøa í Saltangará Jona Thune úr Runavík og Ólavur Justinussen úr Streymnesi. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp kunnu tekna seg á tlf. 226434 og 226432. Seinasta freist at tekna seg er leygardagin 3. juli.

## SILVURBRÚDLEYP

23. juni høvdu Poulina Abrahamsen og Jørleif Petersen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í dag, leygardagin 26. juni í Fuglafjarðar Mentanarhúsi fyri innbodnum.

Mikudagin 21. juli hava Conny og Jógvan Háskor, Tórshavn, verið gift í 25 ár. Veitslan verður á Hotel Føroyum sama dag kl. 19.00. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga frá í seinasta lagi 7. juli á tlf. 313446/217633.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 26. juni, Eiði tlf. 42 30 06
Sunnudagin, 27. juni, Fuglafjørður tlf. 44 40 38

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.


STARVSLÝSING

## Kunningarfólk

**Fyri kunningarfólk okkara í barsilsfarloyvi verður søkt eftir avloysara at byrja beinanvegin á starvsfólkadeildini.**

**Starvsfólkadeildin varðar av starvsfólkamálum, skrivstovufyrisiting og aðrari umsiting.**

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um, í samstarvi við deildarleiðaran og onnur skrivstovufólk á starvsfólkadeildini, at røkja ymiskar uppgávur viðvíkjandi samskifti og kunning innanhýsis og úteftir, heimasíðuviðlíkahald og aðrar meira vanligar skrivstovuuppgávur. Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum, og sum gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving og royndir, helst innan omanfyri nevndu øki, og duga væl at málbera seg skrivliga, serliga á føroyskum. Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, hevur góð samstarvsevni, hugflog, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult og er til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar, um tað skal verða. Góður kunnleiki til tær edvskipanir, ið vanliga verða nýttar á skrivstovum, er ein treyt.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til:
Landsverk
Postsmoga 78
110 Tórshavn
og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 5. juli 2004. Merkið brævbjálvan "Kunningarfólk".
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Levi Hentze, starvsfólkaleiðara, á tlf.311 333 (e-postur:lh@lv.fo).

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn,
Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverkv.fo
LANDSVERK byggir land